# Nøvn

## Føðingar

8. august fingu Priscilla Mikkelsen og Mikael Mikkelsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3150 gr.

31. august fingu Ulla Bundgaard og Heðin Ellingsgaard, Fanø, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 3500 gr.

31. august fingu Helena Holm og Rógvi Thorsteinsson, Tvøroyri, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3740 gr.

3. september fingu Bára Martinsdóttir Strøm og Signar Strøm, Trongisvági, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3880 gr.

3. september fingu Petra Christiansen og Jákup Holm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3295 gr.

3. september fingu Anita og Simon Passey, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2650 gr. Hon eitur Ann Elisabeth Passey.

4. september fingu Siri og Dan Sjóstein, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3710 gr.

4. september fingu Marin Fríhild Simonsen og Einar Hansen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2940 gr.

5. september fingu Eina Øssursdóttir Nielsen og Niels á Reynatúgvu, Signabø, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4440 gr.

6. september fingu Ólrun og Kristján Eiriksson, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4300 gr.

7. september fingu Helen og Jógvan Olsen, Toftum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3425 gr.

7. september fingu Randi Holm og Bárður Brestirsson Nielsen, Saltangará, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3620 gr.

8. september fingu Katrin Sigurðsdóttir og Karstin Kristiansen, Aalborg, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 4270 gr.

9. september fingu Annika V. Hansen og Kristleif Zachariasen, Langasandi, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3525 gr.

## Prógv



Tann 1. juli 2010 fingu Siri Johnsdóttir í Grund, Eiði, og Karolina Guttesen, Tórshavn, prógv sum professiónsbachelorar í sjúkrarøktarfrøði á »Sygeplejerskeuddannelsen Metropol« í Keypmannahavn.

# Ein kvøða til Kára Norðberg, tvíburðabróður mín



*Kári og Róald á 80 ára føðingardegnum seinasta sunnudag*

Eg vil fegin bera kæra tvíburðabróðir mínum, Kára, eina kvøðu, nú vit báðir rundaðu 80 ár sunnudagin, og siga nøkur orð, ið eg kenni, at eg átti at borðið fram við endan á veitsluni í Bethel.

Kári bróðir, vit báðir, sum standa hvør øðrum so nær, heilt frá føðing av, í uppvøkstri og framvegis gera tað – bæði andaliga og tímiliga, hava nógv at takka fyri. Ta tøkkina eigur tann Harri, sum vit hava sett álit okkara á, sum hevur varðveitt okkum frá teimum vandum, ið vit hava verið í og frá teimum vandum, ið vit ongantíð vóru varir við.

Tú hevur havt títt lívsstarv á sjónum, bæði við sluppum og trolarum. Tú sigldi bæði við norskum og føroyskum trolarum og arbeiddi í Føroyingahavnini.

Eg kenni meg ikki sørt stoltan, tá eg hitti menn, sum spyrja, um eg eri bróðir Kára. Teir hava verið til skips saman við tær og kenna teg sum ein sera dugnaligan og raskan mann. Hetta sama er galdandi fyri Jacob, ið nú er 83 ára gamal og somuleiðis fyri Arcibald og Evald, ið eru farnir heim til Harran.

Ólíkir vóru og eru vit báðir. Tú vart djarvur sum fáur, tordi væl til bakka og at fara í línuna at síða. Hetta dirvi hevði eg ikki.

Kæri bróðir, takk fyri løtuna í Hvalba sunnudagin saman við øllum tínum kæru, tá vit komu norður at heilsa tær. Takk fyri alt gott, ið vit nutu har. Eisini takki eg tykkum fyri, at tit komu suður í Bethel at heilsa upp á meg og at vera saman við okkum.

Kári bróðir – tíðin er farin, og hana fáa vit ikki aftur! Men, gott er at vita, at vit stevna ímóti landinum, har einki eitur tíð; har alt er ævigt. Nú eru vit bert fýra brøður eftir og ein systir av ellivu systkjum.

Til seinast vil eg veita eina hjartans tøkk frá okkum báðum til øll, sum heiðraðu okkum og gjørdu dagin ógloymandi fyri okkum. Vit takka fyri sang og talur og alt, sum fór fram við virðing og sóma.

Eg ynski Harrans ríku signing yvir tykkum øll við heilsan úr Sálmi 23.1: "Harrin er hirði mín", og úr Sálmi 37.25: "Eg havi verið ungur og eri vorðin gamal, men ikki havi eg sæð hin rættvísa vinaleysan ella avkom hansara leita eftir breyði."

Við kærleikskvøðu til tín, kæri bróðir.

**Heilsan Róald**

# Merkisdagar

### 90 ára føðingardagur

16. september fyllir Johs. Andr. Næs, Tórshavn, 90 ár. Dagurin verður hildin við hátíðarløtu í Meinigheitshúsinum í Havn leygardagin 18. september kl. 15.

### 85 ára føðingardagur

Týsdagin 14. september verður Margith Nielsen á Eiði 85 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### 80 ára føðingardagur

Sunnudagin 12. september fyllur Petur Danielsen, Hósvík, 80 ár. Dagurin verður hildin 23. september á Giljavegi 40 frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 60 ára føðingardagur

Leygardagin 18. september verður Rúna Berghamar 60 ár. Opið hús verður í Pálsstovu kl. 12-17. Tey, ið vilja gleða hana við at koma, verða biðin um at ringja á tlf. 316033 ella senda teldupost til berghamar@kallnet.fo í seinasta lagi leygardagin 11. september.

### Silvurbrúdleyp

Tirsdag 14. september hava Tórur og Birgitte Johannesen, Sorøvej 42, 4250 Fuglebjerg, silvurbrúdleyp. Der er morgenkaffe kl. 8 på dagen.

### Prógv

28. juni bleiv Margretha Thomsen, Klaksvík, útbúgvin jarðamóðir á jordmoderudannelselskolen København.